

*Heini Joensen kundi mikudagin leggja 14 mál afturat samlaða máltali sínum*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Málveitsla

*Hóast talan ikki var um nakran spennandi dyst, so fingu fáu áskoðararnir mikukvøldið høvi at síggja eina sanna málveitslu*

Jákup Mørk

Tjaldur-Neistin 30-41 (14-20)

Ikki færri enn 71 mál vórðu skotin teir 60 minuttirnar, sum dysturin vardi, og uttan at fara alt ov langt aftur í tíðina kann staðfestast, at hetta er málríkasti dysturin higartil í ár.

Heldur ikki er tað komið fyri fyrr í ár, at eitt lið hevur fingið fleiri enn 40 mál, so neistamenninir hava okkurt at tosa um í dag.

Fyri sigrandi liðið man tað eisini kennast hugaligt, at teir nú hava vunið seg upp á næst ovasta plássið á stigatalvuni, tá málmunurin er betri enn hjá strandingum. Gaman í er VÍF framvegis fýra stig framman fyri Neistan, men neistaliðið hevur so ein dyst til góðar.

**Skoraðu eftir vild**

Fyrstu løtuna av dystinum fylgdust liðini bæði upp eftir máltalvuni, men eftir at Neistin miðskeiðis í fyrra hálvleiki gjørdi eitt lop, var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Seinna helmingin av dystinum var lítið og einki at tosa um, og væl hýrdu neistaleikararnir skoraðu so at siga eftir vild.

Stóri málslúkurin gjørdist enn einaferð Heini Joensen, men merkisvert var tó, at hann hesu ferðina einki mál fekk frá sjey-metra strikuni, har hann annars hevur fingið ein part av sínum málum. Heini er nú einans fimm mál aftan fyri stóra stórskjúttan hjá vestmenningum, og framvegis eigur Heini ein dyst til góðar, so eisini her er tætt millum Neistan og VÍF.

**Eingin hugur**

Størsti trupulleikin hjá Tjaldur tykist vera, at leikararnir ikki taka uppgávu sína í nóg stórum álvara. Liðið telur fleiri stak góðar leikarar, men tá venjingarstøðan ikki er nóg góð, røkist lítið fyri, at úrtøkan í einstøku dystunum verður hin stóra.

Liðið hevur eisini tann veikleika, at fleiri av leikarunum eisini fáast við fyrstudeildarfótbólt, og tí er ikki óhugsandi, at liðið fer at verða nógv skert, tá vit koma út í februar mánað. Tískil verður helst neyðugt at fáa nøkur stig til vega komandi vikurnar, um teir ætla sær av niðastu rókini á stigatalvuni, men við avrikunum seinastu vikurnar í huga, er illa hugsandi at so verður.

**Dysturin í tølum:**
**Málskjúttar:**
Tjaldur: Sverri Justinussen 8, Suni F. Johannesen 5 (1), Ragnar Olsen 5 (4), Arngrímur Arngrímsson 4, Mortan Hansen 4, Arnfinn Langgaard 2, Ken Bærendsen 1, Trygvi Mortensen 1
Neistin: Heini Joensen 14, Finnur Hansson 9, Áki Olsen 7 (1), Elmar Ósá 4, Karl O. Rasmussen 3, Regin Didriksen 2, Jákup S. Kass 2
**Brotskøst:**
Tjaldur 5, Neistin 1
**Útvísingar:**
Tjaldur 1
**Dómarar úr StÍF:**
Alexandur Johansen og Anfinnur Joensen

# Marita átti munin

*Størsti munurin á bestu kvinnuliðunum hjá Kyndli og VÍF var, at Marita Hermansen stóð í málinum hjá Kyndilskvinnunum. Enn einaferð prógvaði hon, at hon helst er besti málverji í bestu kvinnudeildini, og saman við liðfeløgum sínum, syrgdi hon fyri, at dreymabyrjanin hjá Bárði Johannesen á venjarabeinkinum kundi halda á fram*

Jákup Mørk

Kyndil-VÍF 23-21 (14-12)

Fyrrverandi venjarin hjá danska fótbóltslandsliðnum, Richard Møller Nielsen, var tiltikin fyri at nýta mong løgin orðafelli. Eitt av hesum var tað, sum, hann nevndi »laurbæreffekten«, og tað var um reppið, at kyndilskvinnurnar fingu roynt hetta mikukvøldið.

Tað, sum fjónbúgvin meinti við, var tá eitt lið júst hevur fram eitt frálíkt avrik, fyri síðani at nýta ov langa tíð, til at fáa beinini niður aftur á jørðina.

**Ikki at kenna aftur**

Kyndilskvinnurnar vóru nevnliga als ikki at kenna aftur frá sunnudegnum, tá tær mikukvøldið skuldu royna seg móti vestmannakvinnunum, sum undan dystinum vóru nr. tvey í landskappingini.

Ikki tí, leikararnir vóru tær somu, men avrikið tær framdu, var langt frá tí støði, sum tá varð lagt. Í álopspartinum vóru tær als ikki nóg avgjørdar, og serliga í verjupartinum sá tað út til at vera heilt galið.

Lukkutíð fyri heimaliðið, so høvdu vestmannagenturnar heldur ikki ein av sínum bestu døgum. Ioana Rápa leikti tó á sama hátt, sum hon hevur gjørt higartil í kappingini, og tá kyndilskvinnurnar løgdu lítið í at verja fyri henni, kundi hon so at siga einsamøll syrgja fyri, at vestmannagenturnar eisini vóru at síggja á máltalvuni.

Meginpartin av fyrra hálvleiki leikaði javnt á, men móti endanum var tað sum um, at dysturin var um at koppa til fyrimuns fyri heimaliðið. Líkt var til,at Ioana ikki hevði nóg stora orku til at halda á við málskjótingini, og harumframt var eisini líkt til, at Marita Hermansen nú hevði fingið hita í kroppin.

Við tað at Marita nú tók sær av tí mesta, sum varð tveitt móti málinum, eydnaðist tað heimaliðnum at vinna sær eina tvey máls leiðslu, áðrenn farið varð til hálvleiks.

**Óneyðugur spenningur**

Tá seinni hálvleikur byrjaði, var líkt til, at tær á heimaliðnum endiliga vóru vaknaðar úr dvala. Marita stóð seg framhaldandi eins væl, og tá tað so eisini gekk betri við málskjótingini, varð brádliga líkt til, at talan skuldi gerast um ein tryggan sigur til heimaliðið.

Kyndilskvinnurnar megnaðu tó enn einaferð at seta leikferðina niður, og so við og við otaðu vestmannagenturnar seg aftur móti teimum. Heldur ikki tá Ioana fór út á beinkin at hvíla seg, tóktist nakar bati at hómast hjá kyndilsliðnum, og tí var líkt til, at dysturin brádliga skuldi gerast óneyðuga spennandi.

Kyndil fekk einans fimm mál seinastu 25 minuttirnar av dystinum, men orsakað av, at Marita vardi mál teirra, eydnaðist tað teimum kortini at vinna týdningarmikla dystin.

**Gott fyri klaksvíkina**

Einki er at taka seg aftur í, at størsti fagnaðurin um úrslitið man vera í Klaksvík. Stjørnurnar har norðuri fáa alsamt betri kort á hondina, og eru framvegis tvey stig framman fyri nummar næstu liðini, umframt at tær eiga ein dyst til góðar.

Enn er meistaraheitið tó ikki víst, og hóast hvørki Kyndil ella VÍF sýndu, at tær eiga at teljast millum fremstu FM evnini, so er lítið at ivast í, at bæði liðini fara at royna tað tey kunna, til tess at gera spádómunum hjá øllum hondbóltsáskoðarum fyri skommum.

Skal hetta gerast veruleiki, er tó neyðugt at finna annað spæl fram, og tað man eisini vera av alstórum týdningi, at hetta verður gjørt sum skjótast. Í næstum skulu bæði liðini nevnliga royna seg móti klaksvíksgentunum, og skal nøkur vón vera fyri gullmerkjunum, er ivaleyst neyðugt, at Stjørnan missur stig í hesum dystum.

**Dysturin í tølum:**
**Málskjúttar:**
Kyndil: Lotte Sørensen 11 (6), Jórun Ludvig 3, Ann Hansen 3, Rakul N. Joensen 3, Palma Petersen 1, Beinta Sørensen 1, Frida Johannesen 1
VÍF: Ioana Rápá 10 (3), Jacklin Durhuus 5, Óluvá Poulsen 2, Signhild Petersen 1, Fríða Johannesen 1, Nikolina Joensen 1, Randi Kúrberg 1
**Brotskøst:**
Kyndil 6, VÍF 4
**Útvísingar:**
Kyndil 4, VÍF 1
**Dómarar úr Tjaldur:**
Dánjal Hansen og Kári Hansen



*Palma Petersen var sjálv onnur systurin á vøllinum mikudagin, tá Kyndil og VÍF dystaðust. Í bakgrundini sæst stóra systurin, Signhild, sum tó hesu ferð var við undirlutan saman við liðfeløgunum úr Vestmanna*
**Mynd: Álvur Haraldsen**






Seinasta kappingarár var Johan einsamallur um at verja málið hjá FS Vágum, men nú er líkt til, at hann hevur fingið ein kappingarneyta
**Savnsmynd**

# FS Vágar fingið styrk

*Síðani reglan um talvi av útlendingum á føroysku fótbóltsliðunum varð broytt, hevur talið á hesum verið alsamt vaksandi, og nú er talið aftur økt*

Jákup Mørk

FS Vágar, sum seinasta ár vann aðru deild, og harvið tryggjaði sær sess í fyrstu deild komandi kappingarár, hevur nevnliga ogna sær ð fýra útlendskar leikarar, í royndunum at styrkja um leikarahópin.

**Tilvitað**

Framman undan hava vit nevnt, at felagsliðið har vesturi hevur fignið litaviskan venjara henda vegin til komandi kappingarár, og nú er so greitt, at hesin hevur fingið fýra av landsmonnum sínum henda vegin.

Talan er um tveir verjuleikarar umframt ein málmann og miðvallara, og formaðurin í FS Vágum, Álvur Samuelsen, sigur við Sosialin, at tað er tilvitað, at teir hava styrkt seg á júst hesum plássum.

Hann greiður frá, at teir seinasta ár høvdu eitt stak gott álop og ein sterkan miðvøll, men at avrikini í verjuni vóru misjøvn. Fleiri skaðar vóru, og harav var útskiftingin stór, og er tað tí í verjuni, at vit meta okkum hava størsta tørvin at styrkja um liðið.

Seinasta ár vardi Johan á Mýruni málið hjá felagsliðnum, og vit hava verið stak væl nøgdir við avrik hansara sigur Álvur, sum sjálvur vardi málið, tá FS Vágar seinast var í bestu deildini. Trupulleikin er tó tann, at Johan er einasti málmaður okkara, og tískil hevur hann onga kapping fingið, umframt at liðið ongan eyka málverja hevur havt.

Enn er so eingin avgerð tikin um, hvør skal verja málið hetta kappingarárið, so vit hava ikki á nakran hátt avskrivað verandi málverjan.

**Bíta seg fastan**

Leikararnir har vesturi byrjaðu annars at venja seinasta vikuskifti, og verður sæð burtur frá nýggju leikarunum, er talan um sama fólk sum undanfarna ár.

Hetta merkir so, at tað ikki hevur eydnast felagsliðnum at lokka nakrar av fyrrverandi leikarum sínum heim aftur. Her verður serliga hugsað um Johannes Joensen og Bjarna Prior, sum seinastu tíðina hava verið í ávíkavist HB og B36.

Álvur Samuelsen greiður annars frá, at fremsta mál teirra nú er at bíta seg fastan í deildini, og er tað við hesum fyri eyga, at felagið hevur styrkt sær um hópin.

Tað er eingin loyna, at tað er av alstórum týdningi fyri felagið, at vágafólk í framtíðini hava eitt fyrstudeildarlið, sum megnar at standa seg í kappingini, við tað at hetta, umframt ein øktan áhuga, gevur yngru leikarunum nakað at síggja fram til.

Vágoyggin hevur nevnliga í fleiri ár havt góð ungdómslið, og tá fleiri av leikarunum á hesum ivaleyst hava ætlanir um fyrstudeildarfótbólt, er umráðandi at teir fáa møguleika til tess.

**Í Sørvági**

Síðani felagsliðið varð stovnað í 1993, hava ymsu bygdirnar skift um at hýsa heimadystirnar hjá besta liðnum, og í ár verða allir heimadystirnir leiktir í Sørvági.

Í løtuni fer venjingin tó fram í Miðvági, tí umvælingararbeiði verður gjørt við vøllin í Sørvági, men hetta verðru væntandi liðugt um mánaðarskifti februar/mars.

Í hesum sambandi skal eisini nevnast, at SÍ í løtuni leggur seinastu hond á nýggja felagshúsið, og sostatt er líkt til, at bæði áskoðarar og leikarar nú fáa munandi betri umstøður, tá fyrstudeildarfótbóltur stendur á skránni í Sørvági.

# Rætting

Í týsdagsblaðnum stóð í dystarfrásøgnini fyri kvinnudystin millum Stjørnuna og Kyndil, at Rógvi Nielsen varð kosin ársins venjari í kvinnudeildini seinasta ár.

Hetta er sjálvsagt ikki rætt. Rógvi Nielsen varð kosin at vera næst besti venjarin í deildini, meðan starvsfelagi hansara í Kyndli, Sophus Dahl Christiansen, varð kosin at vera besti venjarin í kvinnudeildini.

Vónandi bera teir báðir yvir við okkum hesum viðvíkjandi.

**-blðm.**



*Sophus Dahl Christiansen fær her handa blómur og steyp sum ársins venjari í kvinnudeildini seinasta kappingarár*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Eingin ivi

*Neistin vann tryggan sigur móti Tjaldur, tá liðini bæði hittust inni í Runavíkini mikukvøldið*

Jákup Mørk

Tjaldur-Neistin 17-27 (9-12)

Áðrenn endaspælið byrjaði, skrivaðu vit, at neistakvinnurnar vóru farnar í holt við at leita eftir heiðursmerkjum.

Sum úrslitini lagaðu seg mikukvøldið, er eisini líkt til, at hetta nú er um at gerast veruleiki.

Enn liggja tær á fjórða plássinum á stigatalvuni, men nú er um at gerast rættuliga trongt undir toppinum, við tað at Kyndil, VÍF og Neistin nú øll hava 9 stig. Enn syrgir málmunurin tó fyri, at neistagenturnar halda seg aftan fyri hinar, men eftir dystin í Runavíkini mikukvøldið minkaði hesin munur nakað.

**Munur í seinna**

Neistin vann nevnliga ein greiðan 10 máls sigur móti einum tjaldursliðið, sum dragnar meira og meira frá aftur um hini liðini.

Í fyrra hálvleiki var munurin millum liðini ikki so stórur. Fyrstu 25 minuttirnar gekk javnt á, og liðini bæði skiftust um at hava leiðsluna. Móti endanum av hálvleikinum fekk Neistin tó trý mál á rað, og eftir hetta vendist ikki.

Beinan vegin, sum seinni hálvleikur byrjaði, streyk Neistin av stað, soleiðis at tað eingin ivi skuldi vera um, hvønn veg stigini skuldu fara

Hetta tykist eisini at vera ein afturvendandi trupulleiki hjá Tjaldrinum. Fleiri ferð er tað komið fyri, at liðið hevur fylgt væl við fyrra hálva tíman, men við tað at hópurin er somikið tunnur, gerst munurin aloftast dekan og stórur seinasta partin av dystinum.

Tjaldurskvinnurnar fara tó ongan veg niður í aðru deild hetta kappingarárið, og við hesum er aðalmál teirra longu rokkið. Undan kappingini varð nevnliga sagt, at tær nú máttu royna at halda felagnum í fyrstu deild, soleiðis at ungu leikararnir, sum eru ávegis, hava nakað at síggja fram til, tá tað einaferð verður teirra tíð.

**Kann gerast javnt**

Sum nevnt, so er tað nú vorið rættuliga trongt undir toppinum, og hóast Stjørnan enn situr rímuliga trygt á ovasta sessinum, so eru tað nú heili trý lið, sum stríðast fyri at nærkast klaksvíksgentunum.

Fyrimunurin hjá Stjørnuni er tó helst, at liðini undir teimum framhaldandi taka stig frá hvørjum øðrum, og tískil er líkt til, at Stjørnurnar verða verandi umanfyri hini liðin, tað sum eftir er av kappingarárinum.

**Dysturin í tølum:**
**Málskjúttar:**
Tjaldur: Sunrid Gleðisheygg 5 (3), Sonja Gleðisheygg 5, Mona Langgaard 4 (1), Oddvá Fossdalsá 2, Heidi Jacobsen 1
Neistin: Inga F. Danberg 9 (1), Katrin á Neystabø 8 (5), Gunnleyg Berg 3, Marjun Jógvansdóttir 2, Mildrid Jacobsen 2, Rúna Wardum 2, Bjørg Patursson 1
**Brotskøst:**
Tjaldur 9, Neistin 6
**Útvísingar:**
Tjaldur 2, Neistin 1
**Dómarar úr StÍF:**
Alexandur Johansen og Anfinnur Joensen



*Eingin ivi var um, hvønn veg stigini skuldu fara, tá Tjaldur og Neistin hittust mikukvøldið*
**Mynd: Álvur Haraldsen**